## Grønland í Fólkatingið

Fólkatingið eigur at viðgera viðurskiftini á almannaøkinum í Grønlandi. Tað heldur tingmanningin hjá Danska Fólkaflokkinum og hevur tí sett Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharra ein fyrispurning um viðurskiftini. Søren Espersen úr DF sigur, at Fólkatingið eigur at fáa eina frágreiðing um tann grønlendska almannapolitikkin.Tað er ikki greitt, nær forsætisráðharrin fer at svara, men tað verður neyvan fyrr enn í næsta mánað.



## Illur borgarstjóri

Borgarstjórin í Vestmannaoyggjunum í Íslandi, Elliði Vignisson, heldur, at summir altingsmenn tosa alt ov niðrandi um fiskimenn og tey, sum reka fiskivinnu. Hann harmast um, at summir politikarar umrøða útgerðarmenn sum greivar, ið hava fingið sínar kvotur sum gávu. Borgarstjórin í Vestmannaoyggjunum heldur, at tílíkt orðalag er meiri tyngjandi fyri eitt fiskivinnusamfelag sum Vestmannayggjarnar enn skerdar kvotur.



*Blönduós er ein av bygdunum har vesturi á Norðurlandinum*
*Savnsmynd*

# Nevndir skulu kanna tørv á bygdamenning

**Í Íslandi hevur stjórnin sett tvær nevndir, sum skulu kanna, hvat kann gerast fyri at menna bygdasamfeløgini á Norðurlandinum og á Eysturlandinum**

BYGDAMENNING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Eftiráheitan frá lokalpolitikarum hevur íslendska stjórnin mannað tvær serligar bygdamenningarnevndir. Uppgávan hjá teimum báðum nevndunum er at lata stjórnini álit og uppskot um, hvussu tað almenna kann virka við til at menna mentan, vinnulív, tænastu og flutning, og um tað ber til at flyta almenn størv úr høvuðsstaðarøkinum út á bygd.

Nevndirnar vórðu skipaðar á stjórnarfundi í síðstu viku, og tær skulu ætlandi lata stjórnini álit innan 1. mai. Onnur nevndin skal kanna viðurskiftini í bygdunum har vesturi á Norðurlandinum og koma við uppskotum um tiltøk har. Hin nevndin skal kanna umstøðurnar í eystara parti av Norðurlandinum og á Eystfirðum, og hvat kann gerast fyri at menna bygdirnar har.

Í fjør setti stjórnin eina tilsvarandi nevnd at kanna viðurskiftunum í bygdunum á Vestfirðum. Úrslitið var, at stjórnin samtykti at játta góðar 25 mió. danskar krónur til ymisk tiltøk har í fjør og í ár.

Grundarlagið undir avgerðini hjá stjórnini at kanna tørvin á bygdamenning er millum annað ein frágreiðing, sum lærdi háskúlin í Reykjavík lat stjórnini seinasta summar. Í henni stendur millum annað, at tað er rættiliga misjavnt, hvussu búskaparvøksturin í Íslandi hevur gagnað teimum einstøku landslutunum. Eitt nú verður víst á, at í árunum frá 1998 til 2005 minkaði framleiðslan í vestara parti av Norðurlandinum 1,5 prosent um árið.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!